# Tjóðveldi og frælsar Føroyar



Val X
JÁKUP PETERSEN
valevni til fólkatingið
Tjóðveldi

Í verunleikanum merkir hetta, at Tjóðveldi arbeiðir fyri allar Føroyingar. Vit skulu virka frælst út í heimin sum tjóð og mennast á jøvnum føti við onnur.

Sjálvandi setir hetta stór krøv til okkara útbúgvingar- og granskingarskipan. Menning á hesum økinum krevur gott samband út í heim.

Tjóðveldi vil við sínum umboði í fólkatinginum opna hurðar víðari út í heimin so, at yngri sum eldri fáa víðka um síni tilboð innan útbúgving og gransking. Hetta so, at tey verða betri før, at taka tær avbjóðingar sum alheimsgerðin leggur á okkum.

Neyðugt er, at føroyingar kunnu seta sær saman útbúgving í Føroyum og luttaka í gransking innan øki sum havumhvørvi, troyting av havtilfengi, fiskivunnugransking o.s.fr.

Tað almenna skal fíggja eina støðisgransking til tess at tryggja, at tað ikki bert verða privat vinnulívsáhugamál, ið gera av, hvat verður granskað í Føroyum

Føroysk útbúgving og gransking í altjóða høpi verður ment við atliti til, at fáa norðurlendskar og aðrar altjóða avtalur, at góðkenna føroyskar útbúgvingarmyndugleikar sum próvmyndugleika til starvs- og útbúgvingarførleika um allan heim.

Eisini skal føroyskur lestrarstuðul veitast so, at føroyingar kunnu útbúgva seg um allan heim. Beinleiðis avtalur skulu gerðast við onnur lond og útbúgvingarstovnar um hægri útbúgvingar, og føroyingar skulu í alt størri mun taka lut í altjóða granskingarætlanum.

Stuðla tí Tjóveldi til fólkatingsvalið 13. novembur

# Vit tryggja vælferðina



Val X
EYÐGUNN SAMUELSEN
Javnaðarflokkurin

Eg bjóði meg fram sum valevni til fólkatingsvalið fyri Javnaðarflokkin, av tí einfaldu orsøk at Javnaðarflokkurin raðfestir vælferðina fremst. Aðrir flokkar raðfesta støðuna til ríkisfelagsskapin, um vit skulu vera verðandi í ríkisfelagsskapinum ella gerast eitt fulveldi, ovarlaga. Hesin spurningur, hvat okkara støða í ríkisfelagsgkapinum skal vera, er ikki ein søk, í sjálvum sær, fyri Javnaðarflokkin. Okkara fremsta mál, og harvið tað ið avgerð hvørja støðu vit hava til øll onnur samfelagsmál, er vælferðin og trivnaðurin hjá øllum Føroya fólki. Tað er vælferðin, ið avgerð hvagar kósin skal setast.

Hvat merkir hetta ítøkiliga. Vælferð er at øll hava somu møguleikar til útbúgving, arbeiði, eftirløn, eldrarøkt og lívsins uppihald. Vælferðarsamfelagi Føroyar er nógv ment síðan 1948 tá ið vit fingu heimastýrislógina. Hóast hetta eru vit langt frá komin á mál.

Hóast vit hesi 4 árini í samgongu hava økt útreiðslurnar til almannamál við áleið 500 milliónum, hava skapt møguleikar fyri fleiri hundrað røktarheimsplássum, økt útbúgvingarstuðulin til lesandi við børnum og mangt, mangt annað. So eru fleiri samfelagsbólkar, ið ikki enn hava nóg stóran lut í vælferðini. Serliga hugsi eg her um stakar uppihaldarar, heili 800 fólk í Føroyum, ið við teirra børnum telja áleið 2000 fólk.

Fyri okkum kann støðan til ríkisfelagsskapin ongantíð hava størri týdning enn vælferðin hjá okkara fólki. Tí hoyrir tú ikki Javnaðarflokkin nýta alla sína orku til spurningin, um vit skulu vera innan fyri, mitt í mill um ella uttanfyri ríkisfelagsskapin. Hesin spurningur hevur snøgt sagt ikki fremstu raðfesting í okkara politikki.

Í dag er ein av fortreytunum fyri at tryggja og útbyggja vælferðina, at Føroyar kunnu luttaka aktivt í altjóðagerðini. Í hesum sambandi kunnu vit tosað um ríkisfelagsskapin, kennist hann sum ein spennitroyggja, ein forðing fyri øktari vælferð so fær ríkisrættarligi spurningurin stóran týdning fyri okkara politik.

Góði veljari. Ynskir tú at raðfestingin skal vera økt og betur vælferð fyri fleiri, so er títt val einfalt. So setur tú kross við okkurt av valevnunum hjá Lista C.

# Umboðan



Val X
DAN R. PETERSEN
Javnaðarflokkurin

Fólkaflokkurin og Sambandsflokkurin siga seg ávikavist stuðla Konservativa og Vinstra, fáa teir umboðan í Fólkatingið, so við teimum fáa Anders Fogh og Pia Kjærsgaard tveir trúgvar húskallar. Tjóðveldi er til fals fyri hægstbjóðandi. Tann stjórn, sum er villigast at kappa bondini til Føroyar, fær Høgnasa stuðul. Hann hevur ikki fatað, at tað er í Føroyum, henda avgerð skal takast, um hon skal takast. Havandi í huga, at absolutt ikki er meirluti fyri loysing í Føroyum, er hetta ein sera ódámlig støðutakan.

Vit í Javnaðarflokkinum hava boðað frá, at vit stuðla Sosialdemokratarnar. Tað er náttúrligt fyri okkum javnaðarfólk, tí okkara hugsjón røkkur út um eingjargarðarnar. Eingin hugsjón hevur sum tann socialdemokratiska skapt úrslit. Tí vælferð, trygd og lívsfrælsi, gongur fram um øll onnur politisk mál. Eingin rørsla hevur lyft fólkið sum okkara rørsla, tað eru Norðurlondini besta dømi um.

Vit hava onki ímóti, at ríkið fær eina nýggja stjórn við helle Thorning Smith á odda. Tað hevði verið ein positivur síðuvinningur.

# Okkum nýtist ikki at hyggja út í heim fyri at finna okkara samleika!

Val X
HJØRDIS H. PETERSEN
Valevni Miðfloksins

Ímynda tær hesa støðuna:

Eg og familjan hava tað trygt og gott heima hjá okkum. Men eg haldi at tað hevur týdning av tí at vit liva í 2007 at gerast meir lík grannanum, hóast tað í teirra heimi er harðskapur, ótryggleiki og split. Hetta fyri síðani at "kopiera" teirra máta at gera tingini uppá.. Løgi, vildi eg hildi!!

Eg, Hjørdis Háberg Petersen vil vísa á at tað í 2007, ber til at liva í einum landi, har vit hava lítið av harðskapi, sjálvmorðum, hjúnarskilnaðum o.s.fr.

Hava fyri stuttum fingið hægtøl, ið vísa sera jalig tøl fyri okkara Føroyar

Ikki er neyðugt hjá okkum at finna okkara samleika við at hyggja út í heim. Nei, vit skulu verja tey grundvirðir, ið okkara land er bygt á, tí tey virka!!

Kann vera at vit hava okkurt at læra danir J
X við H-jørdis

# Tað er bert ein vegur til Róm



Val X
HELENA DAM Á NEYSTABØ
Javnaðarflokkurin

Størsta forðingin fyri einari hóvligari menning á sjálvsstýrisleið er støðan hjá tjóðveldinum, at bert tann endaliga loysin er nóg góð, og fæst ikki tann endaliga loysnin – og tað er loysingin við fólkaatkvøðu og grundlóg og tí heila, so er líka frægt at einki hendir. Hetta tosið um, at tað er óvirðiligt at taka smá stig tann rætta vegin, ger, at alt ov langt verður millum tey týdningarmiklu stigini.

Kunnu vit til dømis ikki samskifta við ST beinleiðis, og siga frá, at nú vit vilja taka burtur føroyska fyrivarnið í Kyoto-sáttmálanum, ja, so er best einki at gera, og so halda vit fram at dálka, bara tí at tað ikki er gott nokk, at boða ST frá støðu okkara gjøgnum Danmark.

Hetta ber ongan veg.
Tað er bert tann sum orkar og torir at ganga vegin við teimum nógvu forðingunum – nevniliga samstarvsvegin, ið kemur til "Róm".

Og sannleikin er, at allar yvirtøkur, ja øll framstig á sjálvstýrisleið eru tikin av Javnaðarflokkinum og saman við Javnaðarflokkinum. Og listin er langur. Men eingin gloymir undirgrundina og yvirtøkulógina.

Sum umboð fyri Føroyar á Fólkatingi fari eg at halda fram á hesari leið.